# ítróttur

Nr. 216 • hósdagur • 11. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Arnbjørn og Kristian vunnu



*Arnbjørn Sivertsen og Kristian Magnussen vórðu fremstir, tá FM-kappingin fyri veteranar varð leikt um vikuskiftið*

## Leygardagin varð kappast íFM fyri veteranar í bridge

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Leygardagin varð árliga FM kappingin fyri veteranar í Bridge leikt í Bridgehúsinum í Havn. 12 pør høvdu boða frá luttøku. Fyri at hava loyvið at luttaka í kappingini skal ein vera fyltur 45 ár, og parið skal tilsamans ikki vera "yngri" enn 95 ár.
Kappingin varð skipað sum ein parometur kapping, soleiðis, at fylgjast kundi við støðuni eftir hvørt umfar. Spenningur var allatíð í kappingini og skiftust fleiri pør um at hava oddasessin, men tá ið avtornaði, vóru tað teir báðir, Kristian Magnussen og Arnbjørn Sivertsen, ið fóru avstað við heitinum, tillukku til teir báðar.

1 Arnbjørn Sivertsen - Kristian Magnusen 48
2 Oddmar Danielsen - Einar Ellingsgaard 43
3 Hannis Jacobsen - Hanus Bærentsen 26
4 Salomon Johansen - Zakaris Joensen 20
5 Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen 17
6 Danny Danielsen - Johannes Skaarup 9
7 Henriette Svenstrup - Bjørg Róin 2
8 Høgni Jacobsen - Finn Ougaard -5
9 Helgi Joensen - Niels Nielsen -6
10 Dia Petersen - Hallur Ellingsgaard -21
11 Jenis Tummasarson - Arni Poulsen -48
12 Øssur Wintereig - Hans Jacob Petersen -82

Komandi leygardag verða tvey umfør í liðkappingini í bridge leikt í Handilsskúlanum á Kambsdali, byrja verður at spæla klokkan 10:00.

### Støðan í 1. deild

1 Allan Dahl Christiansen
2 Dia Jacobsen
3 Bogi Simonsen
4 Gunnar Mouritsen
5 Jóna Grunnveit
6 MBM

### Støðan í 2. deild

1 Jórun Johannesen
2 Óli Holm
3 Hallur Ellingsgaard
4 Marita Krosstein
5 Ingolf S. Olsen
6 Sámal P. Johannesen

### Støðan í 3. deild

1 Marjun Restorff
2 Jákup Egholm
3 Mortan Thomsen
4 Rógvi Nielsen

### Grand Prix Parakapping

Sunnudagin kl. 14:00 verður eitt umfar í almennu Grand Prix kappingini, ið FBS skipar fyri. Kappingin verður gjørd sum ein barometur kapping. Spælt verður í Lonini í Fuglafirði.

Tilmelding seinast 15 min. áðrenn kappingin byrjar til Símin Lassaberg, tlf. 744741 ella á mail; bridge@bridge.fo.

## Ein dystur hóskvøldið

Kvinnuliðini hjá VÍF og StÍF fara hóskvøldið at dystast í høllini í Vestmanna.

Hetta tykist mest av øllum vera ein dystur, sum skal gera av, hvat tað ovasta av teimum fýra niðastu liðunum verður. Her hevur VÍF fingið fýra stig burtur úr fyrstu fimm dystunum. StÍF hevur fingið trý stig.

Dómarar í dystinum verða Heri Petersen og Brandur Johannesen.

**-jm**

## Klárt til steypa-kapping-ina

**Hondbóltssambandið hevur kastað lut um, hvussu spælt veðrur fyrstu umførini av steypakappingini**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Lutakastið til fyrstu dystirnar í steypakappingini í hondbólti hevur nú verið. Hjá monnunum er talan ikki enn um lið úr sterkastu deildunum, men tað plagar tó ofta at vera stuttligt at fylgja við, tá tey næstbestu fara at takast, í royndunum at gerast tann parturin, sum skal sleppa at royna seg móti teimum bestu. Fyri at fáa alt at ganga upp til eina cup-skipan, eru tað tó bert tvey lið av teimum niðanfyristandandi, sum sleppa upp í part, tá farið verður undir fjórðingsfinalurnar.

Hjá kvinnunum telir besta deildin átta lið, so her er støðan eitt lítið sindur øðrvísi. Her verða StÍF, Kyndil og Neistin eisini longu við nú í fyrstu umførunum, og vinnararnir av teimum trimum dystunum á yvirlitinum, verða so partur av fjórðingsfinalunum.

Dystirnir í fyrstu umførunum eru hesir:

**Menn**

| nr. | Dystur |
|---|---|
| 0 | H71 II-H71 III |
| 1 | Neistin II-VÍF III |
| 2 | Kyndil II-Stjørnan III |
| 3 | VÍF II-Kyndil III |
| 4 | 0-KÍF II |
| 5 | 2-4 |
| 6 | 1-3 |

**Hjá kvinnunum eru dystirnir hesir**

1 StÍF I-Kyndil II
2 Kyndil I-Neistin II
3 Tjaldur I-H71 II




**Stuðulsfólk**

Søkt verður eftir tveimum stuðulsfólkum til 2 børn í Runavíkar kommunu, at byrja 1. december, ella skjótast gjørligt.

- Talan er um eitt stuðulsstarv á 30 tímar um vikuna, til eina 4 ára gamla gentu. Endamálið við stuðlinum er í samstarvið við avvarðandi myndugleika og foreldur at menna og stimbra gentuna í sosiala samspælinum við onnur børn.
- Talan er harumframt um eitt stuðulsstarv á 30 tímar um vikuna til ein 3 ára gamlan drong. Endamálið við stuðlinum er at menna og stimbra dreingin rørðsluliga, sálarliga og sosialt.

Í báðum førum er arbeiðsstaðurin á ansingarstaðnum hjá barninum. Størvini eru tíðaravmarkaði til 30. juni 2005

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setanin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum verður at senda Barnaverndini í seinasta lagi hósdagin 24. november.

Runavíkar Kommuna.
**Barnaverndarnevndin**
Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26
600 Saltangará

**Koyrikort?**

Nýggj teoriskeið
til persónbil, byrja
**mánadagin 15. november,**
til lastvogn, buss og trailara
**mánadagin 15. november**
**kl. 19.30,**
og motorsúkklu
**týsdagin 16. november**
**kl. 19.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen, koyrilærari, tel 21 10 99 • 21 10 96
John A. Christiansen, koyrilærari, tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

FISKISKIRANNSÓKNARSTOVAN

**Lutakast**

um 10.000 kr. verður í kantinuni á Fiskavirking í Runavík hóskvøldið kl. 19.00. Eisini verða fyribilsúrslit frá merkingarroyndunum løgd fram. Øll eru vælkomin.

Vælútgjørdur **STIGFJORD 28** við fiskiloyvi 5B til sølu.

Føroyabók
*Skrásett grannskoðaravirki*
Vágstún2
FO-700 Klaksvík
Tlf. 455522 · 217505

**Toyota - dele**
**brugte og nye**
Vi sender hver dag til Færøerne
AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

INNBJÓÐING TIL HÁTÍÐARHALD

Í SAMBAND VIÐ, AT FØROYA FELAGIÐ MÓTI KRABBAMEINI HEVUR 25 ÁR Á BAKI Í ÁR, VERÐUR HÁTÍÐARHALD Í KLINGRUNI Í NORÐURLANDAHÚSINUM Í FØROYUM FRÍGGJADAGIN 12 NOV. 2004 KL. 14:00

TILTAKIÐ ER ALMENT

*Skráin*

K 14.00 Tónleikastykki við børnum frá musikkskúlanum
Kl 14.10 Jákup N. Olsen, formaður í Føroya Felag móti Krabbameini, bjóðar vælkomin
Kl 14.15 Jóannes Eidesgaard, løgmaður og verji hjá Føroya Felag móti Krabbameini heldur røðu
Kl 14.20 Erik Wandall, yvirlækni og nevndarlimur í Føroya Felag móti Krabbameini, leggur fram hagtøl um krabbamein í Føroyum
Kl 14.30 Kristianna Hammer, sjúkrarøktarfrøðingur og cand.cur, heldur fyrilestur um vón og krabbamein
Kl 14.45 Tónleikastykki við Børnunum frá Musikkskúlanum
KL14.55 Turið Kjølbro, ritstjóri, leggur fram bókina Okkara millum, ið Føroya Felag móti Krabbameini gevur út í sambandi við, at felagið hevur 25 ár á baki
Kl 15.00 Pál Weihe, formaður í Listafelag Føroya, sigur nøkur orð um málningin/plakatina brot. Ið er gjørd í sambandi við hátíðarhaldið
Kl 15.05 Martin Joensen, tónaskald og listamaður, framførir eitt lag
Kl 15.10 Handan av bókum

Orðdtýrari verður Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna

Høvi verður at keypa bókina "okkara millum" fyri 298 kr og plakatina "Brot" fyri 100 kr.
Øll inntøkan av søluni fer óskerd til Føroya Felag móti Krabbameini.

FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI

Lesið internet Sosialin !

Sosialurin

Mat-seðilin

Hósdagin 11. nov:
**Grýturætt**

Fríggjadagin 12. nov:
**Kotelettir**

Leygardagin 13. nov;
**Svínalundir**

Mánadagin 15. nov:
**Gjørd hara**

Týsdagin 16. nov:
**Stokt flesk**

Mikudagin 17. nov :
**Salt kjøt**

***

**Seinnaparts-TILBOÐ**
frá kl. 14.00:

**Matstovan í Hoyvík**